# Mýkja vøddar í bakarovninum hjá Palle Bager

**Ergo- og Hjálpartól hava nú latið upp í nýggjum hølum í gamla bakarínum hjá Conrad Skaale og Palle Bager**

HANDIL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Ergo- og Hjálpartól er latið upp í nýggjum hølum í J. C. Svabosgøtu 6. Talan er um gamla bakaríið hjá Conrad Skaale, fyrr hjá Palle Bager.

Síðani 1974, tá Conrad Skaale doyði, lat bakaríið aftur, og hava hølini stórt sæð staðið tóm síðani.

Eftir at ognin bleiv lýst til sølu, var stórur áhugi at keypa ognina. Hesin áhugin fall tó nakað, tá Tórshavnar Býráð kunngjørdi at kommunan ætlaði at keypa ognina, og brúka hana í samband við Ellisheimi, í er nærmasti granni.

– Kunngerðin hjá kommununi hevði nakað av blaðskriving við sær, m.a. vísti vínnulívið á, at ognin var sera væl egna til handilshølið, meðan onkur býráðslimur segði, at frí kapping er á økinum, og hann sum vildi hava ognina, skuldi bara koma við hægsta boði, sigur Beinta Lassen, ergoterapeutur, sum og stjóri í Ergo- og Hjálpartól.

Ognin varð seld til hægstbjóðandi, sum var Sp/f Ergo & Hjálpartól, sum síðani hava arbeitt við at umvæla húsini.

Eitt nú hava tey valt at varðveita vakra gamla bakaraovnin, og stendur hann nú sum eitt prýði í handilshølunum.

Ovnurin har breyð, køkur og jóladunnur vóru bakaðar fyrr, er nú ístaðin fyri at baka farin at elta, hann eltir ikki breyð, men eltir vøddar. Ovnurin innan er gjørdur til eitt »Relax Room«, har fýra av heimsins mest framkomnu massagustólum standa.

Umframt handilin húsast viðgerðastova við ergoterapi, sansarúm, relax room og á fyrstu hædd er fundar/undirvísingarhøli.

Handilin lat upp 1. oktober, og í sambandi við upplatingina hava tey móttøku í morgin, fríggjadagin 7. oktober, har øll eru vælkomin.



*Mariann Dam, ergoterapeutur, Eyðbjørg í Dali, krambakvinna og Beinta Lassen, ergoterapeutur og stjóri framman fyri gamla bakarovnin, sum nú er vøddamýkjararúm, eftir at tey hava beint burtur einar tíggju bingjur við múrsteinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Gamla bakaríið hjá Conrad Skaale og fyri hansara tíð hjá Palle Bager, hýsir nú handlinum Ergo- og Hjálpartól*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

STARVSFÓLKALÝSING



## Prentari søkist

Til prentsmiðju okkara søkja vit eftir einum prentara (trykkjara) at byrja sum skjótast. Høvuðsuppgávan hjá hesum prentara verður at prenta á okkara GTOV, men annars at vera við í einum toymi, ið arbeiðir á báðum 4-lita prentmaskinum okkara.

**Vit vænta, at tú:**

- ert álítandi,
- hevur sveinabræv sum trykkjari,
- dugir at koyra Heidelberg prentmaskinur við streymniðurføring,
- er vanur at prenta ymsar uppgávur,
- tekur ábyrgd av arbeiði tínum,
- dugir at samstarva við viðskiftafólk og arbeiðsfelagar tínar.

**Tað er ein fyrimunir, um tú:**

- hevur royndir við CPC og CPTronic,
- hevur royndir við 4-litaðum og/ella 2-litaðum Heidelberg prentmaskinum.

**Vit bjóða tær:**

- eitt avbjóðandi starv í spennandi umhvørvi,
- løn eftir royndum.

**Umsóknarfreist:**
13. oktober 2005.

Vilt tú vita meira, so ring til Jon Hestoy á telefon 31 45 55 ella 59 45 55.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Umsókn sendast til:**
Pf. Føroyaprent
att.: Jon Hestoy
Hoyvíksvegur 59, Postsmoga 3118
110 Tórshavn

Føroyaprent

Hoyvíksvegur 59 Postsmoga 3118 110 Tórshavn Tel. 31 45 55 Fax 31 80 26 hestoy@foroyaprent.fo

Føroyaprent vil tryggja føroyingum eina kappingarføra prentsmiðju, har vit vilja varðveita eitt opið og kundavinaligt umhvørvi. Á Føroyaprent ivast vit ikki í, at nýggjasta tøknin, góða handverkið og tær drúgvu royndirnar geva besta úrslitið. Við 30 starvsfólkum er Føroyaprent størsta grafiska fyritøkan í Føroyum. Føroyaprent er kent fyri at vera ein álítandi og dugnaligur útvegari av grafiskum tænastum, eitt stað har kundin veit, at hansara uppgáva er í tryggum hondum, at leveringstíðin heldur eins og dygdin eisini er í hásæti.

# Hugnakvøld í kirkjukjallaranum í Gøtu

Leygarkvøldið kl 20 verður hugnakvøld við sangi, andakt, drekkamunni og øðrum verður í kirkjukjallaranum í Gøtu.

Tað er Blákrossfelagið í Gøtu, Leirvík og Fuglafirði, sum skipar fyri kvøldinum.

Felagið hevur havt sangkvøld í Leirvík áður. Íblásturin til kvøldið kemur frá sangløtunum, sum eru á Blákross kaféini í Havn, har sangløta er hvørt mánakvøld. Við til hugnakvøldið vera eisini gestir frá kaféini.